## DAGSINS MEINING

# Pávin

Tá ið pólski kardinalurin Karol Woityla tann 16. oktober 1978 gjørdist pávi undir heitinum Jóhannes Páll, var hetta byrjanin til eitt heilt nýtt skeið í søgu katólsku kirkjunnar. Nýggi pávin var tann fyrsti pávi i fleiri hundrað ár, sum ikki var italiumaður, og hann hevði havt eina fyri ein páva óvnaliga starvsleið. Sum ungur var hann gávuríkur sjónleikari, yrkjari, bókmentamaður og framúr góður ítróttarmaður. Men so gjørdist hann alt meira andaliga vaktur og fór at lesa til prest, og henda leiðin endaði við, at hann gjørdist kardinalur í Krakow í Póllandi.

Pávin var fjølbroyttur persónur. Átrúnaðarliga var hann óvikiligur, og hetta gjørdi, at hann í roynd og veru á mongum týðandi átrúnaðarligum og etiskum økjum var sera afturhaldandi, og lutvíst skrúvaði tíðina aftur. Hugsað verður her um fosturtøku, fyribyrging, cølibatið hjá katólskum prestum og støðuna hjá kvinnunum. Her var pávin, sáli, sannførdur um, at talan var um absoluttar sannleikar, sum eingin kundi vika. Sama er um hansara kristniboðan at siga. Hann flutti kirkjuna aftur eftir og var hart ímóti einihvørjari liberalari tulking av evangiliinum.

Men ein pávi hevur sum øllum kunnugt mikið politikst vald. Jóannes Páll var harðrendur antikommunistur og samstarvaði virkin við amerikanskar forsetar fyri at fella kommunismuna í Eystureuropa. Hann eigur tí ein týðandi og stóran leiklut í tí ráki og teimum hendingum, ið elvdu til, at múrurin fall. Frammanundan hevði hann verið sera politiskt virkin í heimlandi sínum Polen, har hann virkaði fyri tí valdskifti, ið eisini har fór fram. Men samstundis, sum hann sýndi sína andstygd fyri kommunismuni, sýndi hann ikki minni andstygd mótvegis vesturlendsku materialismuni og moralska og politiska forfallinum fyri vestan. Hann var eisini heitur talsmaður fyri mannarættindum og sosialum rættvísi. Hartaði mangan vesturlendskar leiðarar fyri teirra atgerðaloysi og líkasælu mótvegis neyðini og fátækdøminum í tilafturskomna heiminum. Hann hevði eisini dirvi til at biðja jødisku tjóðina um fyrigeving fyri alt teir ræðuleikar, sum katólska kirkjan í øldir lata ganga yvir jødarnar og fyri líkasælu kirkjunnar undir nazismuni og fascismuni. Hetta hevði eingin annar pávi áður torað. Her sýndi hann mikið dirvi og persónligt mót. Pávin hevði eisini eina sera fjølbroytta mynd av Miðeystri og virkaði áhaldandi fyri friði og semju í staðin fyri kríggj. Hann lat seg á ongan hátt brúka av USA, men talaði søk palestinara eins og hann talaði søkina hjá øllum teimum, ið vóru fyri kúgan og happing. Alt hetta gjørdi, at Jóannes Páll við røttum var mettur sum ein av heimsisn mætastu monnum. Við deyða pávans er ein av teimum heilt stóru og mest virdu leiðarunum farin og spurningurin verður nú, hvør verður nýggjur pávi. Verður tað eitt siðbundið val, ella fara leiðararnir innan katólsku kirkjuna at nýta høvið at kjósa sær nýggjan páva úr einum ikki europæskum heimsparti. Tað er stóri spurningurin í dag.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fleiri sjúkrarøktarfrøðingar heldur enn heilsuatstøðingar

**Annemi Joensen**

Javnt og savnt verður, bæði í fjølmiðlum og av tingsins røðarapallið, sagt at hægri vitanin er, betur er dygd. Tí má førleikamenning og gransking stuðlast fíggjarliga. Tí er m.a granskingarstovnurin stovnaður.

Tó er tað eitt fakøkið, har tað, í dag eyðsæð, ikki verður mett neyðugt at framleiða hægst møguliga vitan. Tað er innan sjúkrarøktina. Her er heldur tað øvugta galdandi. Tí, sum er, verður fíggjarlig orka brúkt at seta á stovn útbúgving at framleiða lægri vitanarstøðið - útbúgvingina til heilsuatstøðing, heldur enn at gera meira brúk av eini vitansframleiðslu á einum hægri vitanarstøði, sum longu finst í landinum - útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing. Ikki fyri at taka nakað frá nøkrum, so er tað nú einaferð so, at sjúkrarøktarfrøðingar hava eina stórri og breiðari vitan enn heilsuatstøðingarnir.

Hóast tað er ein politisk avgerð, at vit, í Føroyum, skulu hava útbúgving til heilsuatstøðing, fari eg at loyva mær at gera nakrar viðmerkingar til hesa avgerð.

Hví henda útbúgving skal setast á stovn, kann bert gitast um, tí onki hevur verið alment framført sum grundgevan frá politiskari síðu.

Tó kann tað hugsast, at ein viðvirkandi orsøk er, at tað verður framført, at Føroyar mangla/ fara at mangla sjúkrarøktarfrøðingar.

Um hettar er orsøkin, so er at undrast yvir, hví ein nýggj útbúgving skal setast á stovn fyri at nøkta hesum tørvi. Vit hava jú, sum longu framført, ein skúla, sum útbúgvir sjúkrarøktarfrøðingar. Mær vitandi hevur henda útbúgving, fakliga, altíð kunna brúkst til arbeiðið innan sjúkrarøktina. Spurningurin er so, hví hon ikki kann brúkast nú, men at tað verður hildið neyðugt fígging nýggja útbúgving at starvast innan sama økið.

Er orsøkin aftur her, at fáa møguleika at trýsta sjúkrarøktarfrøðingarnar úr teimum størvum, sum teir søguliga altíð hava røkt?

At tað er ein fíggjarlig útreiðsla at seta heilsuatstøðingarútbúgvingina á stovn, er eyðsýnt.

Fyri at útbúgvingina í heila tikið kann byrjað, krevst, at hølir skulu finnast, har skúlin kann húsast. Haraftrat skulu lærarir við nøktandi útbúgving setast. Innbúgv, bøkur o. a. sum krevst, fyri at kunna virka sum skúli, skal keypast. Haraftrat kemur tann dagligi raksturin. Alt hettar krevur fígging. Tá hettar so samstundis verður hildið uppímóti, at tað ikki er gjørd nøkur tørvskanning, við atlitið til, um tað í heila tikið, er brúk fyri heilsuatstøðingum, og møguliga hvussu nógvum.

Neyðugt er eisini at umhugsa, hvat verður gjørt, um/tá tilgongdin til skúlan næstan verður/er ongin, ella tá tørvurin á arbeiðsmegi er nøktaður.

Haraftrat skal, sum longu nevnt, samstundis havast í huga, at tað longu frammanundan er ein skúli, sum kann útbúgva fólk til sjúkrarøktina.

Øll hesi viðurskifti gera, at ein kann loyva sær at seta spurnartekin við, um raðfestingini av fíggjarligu orkuni hjá landinum, í hesum føri, er røtt, ella í hvussu er, spyrja hvørjum raðfestingin er gjørd út frá.

Tað liggur í kortunum, at útbúgvingin til heilsuatstøðing skal liggja saman við Heilsuskúlanum, sum í løtuni, er á Tvøroyri. Sjálvandi verður nakað av meirkostnaðinum til útbúgvingina, á henda hátt, spard. Eisini kann verða framført, at heilsuútbúgvingin er stytri, og tí bíligari.

At taka tvey hold av lesandi inn á Sjúkrarøktarfrøðiskúlan er sjálvandi heldur ikki kostnaðarleyst. Meirkostnaðurin fer bæði at skildast øktum lærara-tørvi og at skúlin skal hava stórri hølir. Víðvíkjandi hølunum, so kundi hettar verið loyst við at hava tað í huga, nú skúlin álíkavæl skal í onnur hølir.

Viðvíkjandi lønarspurninginum, so er lønarmunurin um uml. 10%.

Men nógvar og stórar kanningar hava víst, at útbúgvingarstøðið hjá røktarstarvsfólkið lutfaldsliga hongur saman við fylgjusjúkur hjá sjúklingum/-brúkarum, soleiðis at skilja, at hægri útbúgvingarstøðið er, færri eru fylgjusjúkurnar. Hettar skuldi verið ein sparing í sær sjálvum. Tað bert ein spurningur um, hvørjum kassa peningurin fer úr - at flyta pengar millum tey ymsu ráðini.

Ein grundgeving fyri at byrja hesa nýggju útbúgving og leggja hana í Suðuroy, kann haraftrat vera at politikarirnir vilja skapað arbeiðspláss í oynni. Um hugt verður eftir landafrøðiliga býtinum í tí síðsta flokkinum, sum bleiv avlærdur frá Heilsuskúlanum, so var býtið uml. helvt um helvt ávíkavist frá Suðuroy og frá norðanfjørðs, hóast at fólkatalsbýtið í Føroyum ávíkavist er 5000 og 43.000. Hettar ójavna býtið kann ein gera sær ymiskar hugsanar um, og, sum Storm P. segði, so er ringt at spáða um framtíðina. Men vert er at hava í huga, at um útbúgvingin til heilsuatstøðing fer at liggja í Suðuroy, so verður tað kanska haðani, stórsta tilgongdin til útbúgvingina fer at verða.

Ætlaða ellisheimið í Suðuroy er kanska ætlað teimum, ið koma frá ætlaða heilsuatstøðingarútbúgvingini.

Men ellisheimið verður einaferð fullmannað. Úrslitið kann tá skjótt gerast, at Føroyar fáa eina oyggj við arbeiðsleysum heilsuatstøðingum. Er grundgevingin hjá politikaranum, at hjálpa Suðuroynni við arbeiðsplássum, kann henda avgerð skjótt fáa ta óhepnu avleiðing, at fleiri verða noydd at fara av oynni at fáa arbeiðið. Hvat er so vunnið?

Tí vildi eg mett, alt annað líka, at tað hevði verið eitt

*Framhald á síðu 11*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**

Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.